# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*"Tað er tað minst varda menniskja, sum er í mesta vanda fyri at verða álvarliga skatt í ferðsluni"*

*Kelda: Ferdslutrygd*

## FAKTA

**Mitsubishi L200 Intense Double Cab**

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 2.5 litur turbodiesel 136 hk v. commonrail innspræning |
| **Dekkstødd** | 245/65-17 |
| Stødd og vekt | |
| **Longd** | 500,0 cm |
| **Breidd** | 175,0 cm |
| **Hædd** | 177,5 cm |
| **Eginvekt** | 1.783 kg |
| **Totalvekt** | 2.852 kg |
| **Lastar** | 1.067 kg |
| **Prísur** | kr. 384.000,- sum persónbilur<br>kr. 284.000,- sum Van |
| **Søluumboð** | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |

Mitsubishi L200 Double Cab:

# Smartur og elegantur pick-up




*Mitsubishi L200 Double Cab við dupultari kabinu er rúmligur 5-perónabilur við last*

**At ein arbeiðsbilur ikki bert nýtist at vera praktiskur, men eisini kann síggja smartur og elegantur út, er nýggi Mitsubishi L200 besta prógvið um. Bilurin fæst bæði sum Club Cab og sum Double Cab**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Innan er eisini alt nýdesignað. Til ber at skifta millum 2WD ogWD, meðan bilurin koyrir við upp til 100 km/t.*



*Motorurin orkar væl, lastin er lutfalsliga stór, og bilurin lastar 1.067 kg*

Mitsubishi L200 hevur í mong ár verið ein kendur og væl umtóktur pick-up, sum verður nógv brúktur sum arbeiðsbilur og av teimum, ið hava serligan flutningstørv og t.d. koyra á ósløttum ella í brøttum lendi.

Hesin nýggi L200 er ein heilt nýggjur bilur, sum veruliga sær út av nøkrum. Hann sær nokk so amerikanskur út og er helst eisini gjørdur við amerikanska marknaðinum fyri eygað.

Mitsubishi L200 verður gjørdur við bæði einkultari kabinu (Club Cab) og við dupultari kabinu (Double Cab). Double Cab er faktiskt ein rúmligur 5-persónabilur við last.

Innanereisinialtnýdesignað. Í instrumentborðinum er ein telda við t.d. barometri, kumpass, hæddarmátara, temperaturmátaraogbrennievnisnýtslumátara.

Motorurin er ein 2.5 litur DI-D diesel við commonrail innspræning og 136 hk. Snúningsmomentið er upp á 314 Nm við 2.000 o/min, so talan er um ein bil ið orkar væl, hóast hann er tungt lastaður.

Super Select 4WD skipanin ger tað lætt at skifta millum 2WD og 4WD, meðan bilurin koyrir við eini ferð upp til 100 km/t.

Viðvíkjandi trygdini kunnu vit nevna at L200 hevur bæði elektroniskt stabilitetkontroll og antispinn, ASTC (Active Stability and Traction Control), sum gevur bilinum upp aftur betur 4x4 eginleikar undir vánaligum koyriumstøðum.

L200 er sera væl útgjørdur, og so gott sum alt er standard, sum t.d. ABS bremsuskipan við EBD, heilautomatiskt aircondition, hiti í setrunum, el-síðuspegl við hita, trinbretti á síðunum, útbygdar skermar, alu-felgur og tokulyktir.

L200 fæst bæði sum persónvognur og sum Van. Bíligasti L200 kostar kr. 255.000,-, tá er talan um ein Club Cab í Invite útgávuni.